# Guðrun og Guðrun vekja ans




*Politiken ruddaði sunnudagin forsíðuna fyri framsýningini hjá Guðrun og Guðrun í hangarinum í Vágum. Og mótaframsýningin fær eisini drúgva umtalu inni í blaðnum*

**Føroyska framsýningin í hangarinum í Vágum var ikki til fánýtis. Donsk bløð gera nógv burtur úr mótavikuni í Keypmannahavn, og her hava Guðrun og Guðrun tryggjað sær almikið spaltipláss**

MÓTI
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Politiken hevði sunnudagin sett tíggju síður av til mótavikuna í Keypmannahavn, og av hesum fekk Guðrun og Guðrun tríggjar heilar síður umframt eina stóra forsíðumynd.

Greinin er tvíbýtt við einari rósandi lýsing av stóru altjóða mótaframsýningini har danskar stjørnur og altjóða mótaserfrøðingar vóru bjóða við og ein hugnalig mynd av einari føroyskari bindikonu hjá Guðrun og Guðrun.

Blaðkvinnan hjá Politiken, Louise Gade, hugleiðir um mótsetningin ímillum siðbundnu føroysku bindingina og døggfrísku mótawrákið.

- Hvad, hun er i færd med at kreere med sine aldrende hænder, bliver til noget af det mest fashionable tekstil på catwalken i øjeblikket.

Bindikonan greiðir frá, at hon hevur bundið síðani hon var fýra ára gomul, og at myrki føroyski veturin er góður at binda í.

Túrurin til Føroya er øðrvísi enn aðrar mótasýningar, og blaðkvinnan er hugtikin av føroyska umhvørvinum. Altjóða mótamiðlarnir og donsku stjørnurnar eru, sambært blaðkvinnuni »henrykte« - bæði um matin í Müllers Pakkhúsið, busstúrin aftur og fram og framsýningina í hangarinum. Føroyska umhvørvið fær hesi orð:

- En heftig og netop oversået haglbyge har fået tagene på byens huse til at ligne hvidglaserede konditorkager, og den hvide idyl forstærkes, mens vi passerer imponerende bjerge med sneklædte tinder og bittesmå vandløb, størknet som krummelurer.




*Danski myndateksturin sigur: »Mens runpinden knitrer i Inga Ellingsgårds hænder, nyder det københavnske jetset den eksklusive buffet et kvarters gang derfra. Her har direktøren for tøjfirmaet Hummel, Christian Stadil nuppet et frugtspyd. Ved siden af står grevinde Alexandras mand Martin Jørgensen«*

Adventistaskúlin



MÓTTØKA

Móttøka verður
**fríggjadagin 15. februar 2008**
frá kl. 15-17
í samband við at nýggi skúlabygningur okkara alment verður tikin í nýtslu.

Hoyvíksvegur 56 · FO-100 Tórshavn · Tel. 31 32 60 · sdaskuli@post.olivant.fo

www.skulin.fo/adv